LØGMANSSKRIVSTOVAN

## Út í norðurlond

Nú ber til at søkja um stuðul at fara í annað norðurland at arbeiða.

Umsóknarfreist 5. januar 2005.

Sí meira á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni www.tinganes.fo

Sosialurin -har tað hendir

felagið Tórshøll

í vikuskiftinum spæla:

TEY AV KAMARINUM

BINGO
VERÐUR FRÍGGJAKVØLDIÐ 26. NOVEMBER
kl. 20.00

JÓLABORÐHALD
VERÐUR LEYGARKVØLDIÐ 4. DESEMBER
kl. 19.30
tekningarlisti liggur frammi

## Vágs skúli

Vegna avlopstímar verður søkt eftir lærara til 15 tímar/viku (6 tímar í 7. flokki og 9 stuðulstímar).

Starvið er tíðaravmarkað frá 3. januar 2005 til 30. juni 2005.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlaleiðaran, tlf. 373192.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við ljósriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera skúlastýrinum í hendi seinast mánadagin 6. desember 2004.

**Skúlastýrið fyri Vágs skúla**
**v/ Egill Steintórsson**
**900 Vágur**

EKSPORT AF FIREHJULSTRÆKKERE



find deres nye bil på:
www.firexfire.dk
tel +45 8610 4300 · fax +45 8610 4360

Honda Accord til sølu



Reyður · Árg. 2001 · Km. 70.000
Ring og hoyr nærri á tel 25 13 21

Lesið Sosialin -so eru tit við!

KIA VEKSUR SEG STÓRT Í EVROPA

VIÐ STÓRUM ÚRVALI - GÓÐARI GÓÐSKU OG BESTA GARANTI

PICANTO 1.0 LX



62 HK · 5 HURÐAR 118.800,-

CARNIVAL 2.9 TDI LX



144 HK · 5 HURÐAR 271.800,-

MAGNETIS 2.0 LX



136 HK · 4 HURÐAR 189.800,-

2700 2.7D 3.2T



3 pers. · Diff. sperru 165.800,-

CARENS 1.8 EX



126 HK · 5 HURÐAR 211.800,-

CERATO 1.6 EX



105 HK · 5 HURÐAR 184.800,-

PREGIO 2.5TD



3 pers. 169.800,-

RIO 1.3 LS COMBI COUPE



81 HK · 5 HURÐAR 153.800,-

SORENTO 2.5 TDI 4WD



140 HK · 5 HURÐAR 384.800,-

D. B. Bilar
J. Broncksgøta 15 · FO-110 Tórshavn · Tel 310600

SERAVSLÁTTUR UTTAN BIL Í BÝTI - FRAM TIL JÓLA

ítróttur

Nr. 227 • fríggjadagur • 26. november 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Kyndil-Neistin 42-21 (19-10):

# Ein ordans umgangur

**Neistin fekk ein avsmurning av sjáldsomum dimensiónum, tá teir hvørki maktaðu ella vildu gera Kyndli stórvegis ónáðir**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Umberingar millum viðhaldsfólk hjá Neistanum eru helst fleiri í tali eftir grannauppgerðin móti Kyndli mikukvøldið.

Millum annað varð longu undan dystinum staðfest, at hvørki Damir Oros ella Blagoje Buha vóru tøkir til dystin, og at hetta uttan iva fór at skerja liðið nakað.

Hjá Kyndli vóru allir mans tøkir. Tað hevur tó áður víst seg, at hetta í sjálvum sær ikki er nakað garanti, og hja´grønu viðhaldsfólkunum mundi størsti óttin vera, at talan skuldi gerast um enn eitt kvøld, har Kyndil sum favorittur skuldi snáva í einum annars á pappírinum løttum dysti.



*Tróndur Kragesteen royndi at stríðast á einum annars tomum Neista-liði, men einsamallur fekk hann ikki gjørt stórvegis við væl smurdu Kyndils-maskinuna*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Væntandi hugburður

Men tað gjørdist talan so ongantíð um mikukvøldið. Fyrst og fremst tí Kyndil frá fyrsta bríksli tóktist uppsettir uppá, at hetta skuldi ikki kiksa. Í álopspartinum fann Jakob Jónsson alt fyri eitt rætta stevið, og eftir at Áki Mørk var sloppin til skot einar tværtríggjar ferðir fyrstu løtuna, hevði Kyndil lisið hesa álopshóttanina av, og so varð stongt í verjupartinum.

Og so var mest sum liðugt hjá Neistanum. Úr 3-3 broyttist støðan til 12-3, og orðið, bankur, var so smátt farið at lúra í høllini. Fremsta orsøkin var, at Neistin fyrstu heilt longu løtuna ikki hevði nakað annað álopsvápn, enn at lata ein illa upplagdan Áka Mørk stýra spælinum, umframt at Dann Thorleifsson so kundi høgga okkurt skotið inn av og á.

Hartil tóktist innsatsurin hjá Neistanum á ongan hátt benda tann vegin, at menninir trúu upp á møguleikan í dystinum.

Og tað gerst ikki órevsað móti Kyndli. Serliga ikki, tá hugburðurin hjá leikarunum er av slíkum slag, sum hann var mikukvøldið. At talan er um sterkan hóp, sást kanska einamest á beinkinum. Her sótu leikarar sukm Ragnar Stakksund, Janus Einar Sørensen og Finnur Hansson fyrstu løtuna, og so kundi tað mest sum gera tað sama, hvussu skift varð út. Kyndil var á øllum plássum munandi betri fyri. Og tann staðfestingin gjørdist bara alt sterkari, sum dysturin leið.

### Kyndil ávegis endurtøku

Skal Neistin taka nakran lærdóm við sær úr dystinum, so má hesin fyrst og fremst vera, at megnar tú ikki at spæla, so noyðist tú at stríðast. Tann hugburðin var ungi Tróndur Kragesteen einsamallur um at vísa mikukvøldið.

Hartil tóktist dysturin eisini prógva, at enn er breiddin á bláa liðnum ov lítil, til at teir veruliga kunnu gera um seg í oddinum.

Kyndil tóktist hinvegin enn einaferð prógva, at liðið avgjørt hevur møguleikan til aftur at enda ovast. Ein tann størsta styrkin hjá liðnum er helst, talið av profilum, sum kunnu avgera ein dyst, er somikið stórt, at tað nærum altíð eru ein ella tveir, sum hava ein góðan dag. Kryddað við teknisku finessunum hjá Jakob Jónsson tykist hetta vera ein blanding, sum fá onnur lið kunnu matcha. Hartil er málmunurin hjá liðnum longu nú somikið góður, at hetta í sjálvum sær kann vera eitt eyka stig vert. So er einasti spurningurin, um liðið megnar at halda støðinum gjøgnum alt árið. Hetta hevur áður víst seg sum ein trupulleiki, men svarið upp á hendan spurningin fæst kanska longu komandi sunnudag, tá VÍF er mótstøðuliðið í Vestmanna.

**FAKTA**

**Kyndil-Neistin 42-21 (19-10)**

**Málskjúttar**
**Kyndil:** Josef Abrahamsen 11(3), Høgni Klein 9, Jakob Jónsson 7, Rókur Akralíð 6, Finnur Hansson 3, Hans Arni Thomsen 2, Janus Einar Sørensen 2, Ragnar Stakksund 1, Hans Áki Dal Christiansen 1
**Neistin:** Tróndur Kragesteen 7(3), Dann Thorleifsson 4, Jón Ludvig 4, Áki Mørk 2, Helgi Michelsen 1, Roar Dasgarð 1, Freddie Poulsen 1, Rani Slættanes 1
**Brotskøst:** Kyndil 5, Neistin 4
**Útvísingar:** Kyndil 3, Neistin 3
**Dómarar:** Pole Hansen & Hartvig Joensen. Høvdu fleiri heldur løgnar dómar

# Bólturin latin feløgunum

Kappingarnevndin hjá HSF hevur nú tikið avgerð um, hvussu farast skal fram í sambandi við dystirnar hjá Stjørnuni móti ávíkavist Tjaldri og Kyndli. Báðir dystirnir vórðu í fyrsta umfari av ongum. Hetta tí bæði Tjaldur og Kyndil undir fyriliggjandi umstøðunum bóru seg undan at koma norður til dystin.

Kjakast hevur verið dúgliga um, hvat hevur verið rættast at gjørt hjá kappingarnevndini. Summi hava hildið, at Stjørnan skal dømast at vinna báðar dystirnar uttan dyst, meðan onnur hava hildið fast um, at ein roynd skal gerast at fáa dystirnar avgreiddar.

Nú hevur kappingarnevndin so valt eina at kalla salamoniska loysn. Boð eru nevnliga givin til feløgini um, at tey innan eina ávísa tíðarfreist skulu hava dystirnar avgreiddar. Verða teir ikki tað, verður Stjørnan dømt at vinna dystirnar 0-0.

Hetta vil so eisini innibera, at Tjaldur og Kyndil missa heimavøll í seinna dystinum móti Stjørnuni í grundspælinum. Men tað er so treytað av, at tað ikki ber til at avgreiða fyribils útsettu dystirnar.

### Málini ávirka ikki

Tað hevur verið tosað um, at møguligir sigrar á skrivaraborðinum fáa vansar fyri Stjørnuna, sum við hesum helst kundi missa nøkur týðandi mál í mun til argastu kappingarneytarnar. Men soleiðis verður tó ikki.

Grein 7.7 í kappingarreglunum fyri hondbólt ásetur m.a., at um slíkar hendingar hava týdning fyri endaligu raðfylgjuna í eini kapping, fella málini hjá øðrum liðum í dystum móti nevnda mótstøðuliði burtur, tá málmunur ella flest skotin verða roknað.

**-jm**